Lagt til rættis: Rigmor Dam

# Vilt tú hoyra eitt loyndarmál?

Hvønn mánað vitja 3 milliónir fólk heimasíðuna postsecret.com, har postkort við loyndarmálum hjá fólki verða almannakunngjørd hvønn mánað.

Heimasíðan byrjaði sum ein listaverkætlan, har heitt varð á fólk um at prýða eitt postkort og skriva eitt loyndarmál, sum tey ongantíð høvdu fortalt øðrum.

Higartil hava 180.000 fólk sent loyndarmál til: PostSecret, 13345 Copper Ridge Rd., Germantown, Maryland, 20874, USA. Tú kanst eisini senda tín loynidóm inn

**Dømi um loyndarmál, sum vit kunnu lesa um á heimasíðuni:**

- Tá eg eri súr, koyri eg hár í matin hjá manninum
- Eg gangi altíð í skitnum undirklæðum
- Eg tekni naknar damur í hotel-bibliur
- Eg viðgangi ikki, at eg eri bøssi, tí eg vil vera forseti
- Brúðarkjólin hjá mammu var mega-ljótur




Onkuntíð noyði eg meg at gráta, meðan eg koyri heim, fyri at síggja reaktiónirnar hjá teimum, sum koyra framvið




Mamma mín hevur eina tatovering á reyvini.
Hon segði, at eg aldrin í verðini mátti siga tað fyri nøkrum.
Ljót er hon eisini




Hvørja ferð, eg koyri við Cue leiðini, seti eg meg við vilja við síðuna av løgnasta persóninum í bussinum í vón um, at hann ger okkurt skitsvakt, so eg fái eina søgu at fortelja vinum mínum




Eg fái bara ikki meg sjálva til at gera tað, sum er rætt




Hendan St. Patricksdagin eru tað trý ár síðani, tú tók mín moydóm. Eg haldi, at tað var neyðtøka …




Eg onaneraði við einum løddum revolvara. Sjeikurin, eg hevði tá, fekk meg ikki at koma - tað gjørdi løddi revolvarin




Eg leggi pressað blomstur inn í bókasavnsbøkur, tá eg lati tær inn aftur




Tess snøggari tín handskrift er, tess betri taki eg mær av tínum tryggingarskjølum




Eg vildi ynskt, eg hevði onkran at tosa við, sum kundi sissa meg og sagt, at tað skal nokk ganga - heldur enn at leypa yvir til medisinskápið eftir eini Xanax